

*Var eg kroati, hevði eg helst viljað búð í Kroatia, men tá eg nú eri føroyingur, er tað í Føroyum, eg vil búgva*

*Árini í danska høvuðsstaðnum vóru bæði góð og gevandi*



er og so víðari og so víðari.

Jú, tí Føroyar eru og verða okkara land – um vit vilja tað ella ikki. Tað er her, vit hoyra heima og eisini kenna okkum heima.

Eitt ynski um at børnini læra føroyskt og føðiland okkara at kenna, spældi eisini ein stóran leiklut. Sum foreldur lá avgerðin í okkara hondum, men um bert fá ár lá hon ikki longur hjá okkum, men hjá børnunum sjálvum – um vit skuldu hava tey við, væl at merkja, tí sjálvandi kanst tú altíð flyta. Trupulleikin er oftani løtan, sum kanska ongantíð tykist tann rætta.

Tað vil altíð liggja ein ivi í bakhøvdinum; tí tú veitst, hvat tú sigur farvæl til, men ikki altíð, hvat tú sigur góðandag til.

Men, men, men Føroyar eru mítt land, og soleiðis verður tað.